# Er Liam Gallagher ein komandi Gorilla?



*Teknirøð bólkurin Gorillaz hevur borðreitt við stuttligum samstørvum millum nógv ymisk fólk.*

Blur sangarin Damon Albarn, ið var partur av tí stóra Brit Pop krígnum millum Blur og Oasis, sigur við bretska dagblaðið The Mirror, at hann hevði elskað, at havt Oasis sangaran Liam Gallagher við á næstu fløgu hjá teknirøð bólkinum hjá Albarn, Gorillaz.
Men Damon Albarn sigur í sama viðfangi, at í løtuni arbeiðir bólkurin ikki við eini fløgu, men er ístaðin í ferð við at gera ein spælifilm, so næsta fløga verður filmtónleikur. Hann sigur, at vit kunnu hyggja hvussu tað gongur hjá Gallagher komandi árið, og at hann væntar, at Gallagher ivaleyst fer at klára seg í sínum egna bólki, uttan hjálp frá Albarn.



*Oasis sangarin Liam Gallagher er sambært Damon Albarn vælkomin í Gorillaz.*

## PARIS: ALLIR TEIR LEKRU ERU GJEIKARAR



*Paris Hilton dámdi væl Stavros Niarchos, men nú tað er liðugt, hevur hon trupult við at fáa tann rætta.*

Fyri eini viku síðan varð tað liðugt millum Paris Hilton og Stavros Niarchos, hetta merkir sjálvandi, at Paris sleppur inn á øll dansistøð aftur, nú hon ikki hevur tann unga sjeikin longur, menParis hevur eftir øllum at døma trupulleikar við at finna ein avloysara til Niarchos.
Hon sigur nevniliga við Out Magazine, at henni dámar best samkyntar menn. Teir leggja meira í sína útsjónd, og lata flottari í. Sutt sagt eru samkyntir menn nógv meira eggiligir, sigur París. "Allir teir lekru eru gjeikarar", sigur hon og heldur somuleiðis, at samkyntir menn er nógv stuttligari enn hinkyntir, skrivar bretska blaðið The Sun.

## IKKI LONGUR Í SJEYNDA HIMLI



*Camden familjan fer ikki longur at lata sjónvarpshyggjararnar fylgja teimum í gerandisdegnum.*

Sjónvarpsrøðin 7th Heaven er tann familju sjónvarpsrøðin, ið hevur verið víst í longst tíð. Í heili 10 ár, hava vit fylgt Camden presti, konu hansara og børnunum. Men nú gevst sjónvarpsrøðin. Mánadagin varð síðsti partur av 7th Heaven sendur í USA, og bleiv sonurin hjá Camden presti Simon, giftur í partinum.
Við hesum parti takkar Camden familjan fyri seg, og tær 5,5 milliónirnar av fólki, ið hvørja viku hyggja eftir sjónvarpsrøðini, noyðast at finna okkurt annað at hyggja at.
Hóast nógvar leysasøgur hava gingið, um at sjónvarpsrøðin fór at halda fram alíkavæl, men hvørki Stephen Collins, ið spælir Camden prestur ella Brenda Hampton, ið er framleiðslustjóri, siga seg vita nakað annað enn at røðin nú gevst.

## SANDLER ER BIG DADDY




*Adam Sandler skal nú spæla leiklutin sum Big Daddy við hús.*

Í filminum Big Daddy frá 1999 spælir Adam Sandler ein hopleysur faðirfigurur fyri ein lítlan drong. Big Daddy er ein skemtifilmur, og royndirnar hjá Sandler at uppdraga dreingin eru øðrvísi, stuttligar og sera undarligar. Men okkurt mundi hann gera rætt í filminum. Tí hann hitti konu sína Jackie undir filmingini. Tey vórðu gift í 2003, og leygarkvøldið fekk Adam Sandler leiklutin, sum Big Daddy í teirra familju, tá Jackie átti eina vælskapta gentu. So verður spennandi at síggja, um Sandler megnar hendan leiklutin líka væl í veruleikanum sum á filmi.

